

Lagið var gott og um kvøldarnar var sungið aftur við harmonikutónum




Skiparin prátar við Orkney Today, umboð fyri lokalu fjølmiðlarnar



Frá Suðuroy til Havnina var Westward Ho stúgvandi full, tí Jóhanna legði at í Vági



Jaspur Vang (h.m.) hevur verið skipari á øllum túrurin hjá Westward Ho til Orknoyggjar

Club, har teir vóru sera væl móttiknir.

### Sokkin herskip

Leygardagin skuldu Orknoyggjarnar upplivast. Bussur varð leigaður og vitjað var á eini Whiskey fyritøku, Highland Park, og á tí sonevnda Italian Chapel, sum er bygt av italskum krígsfangum.

Síðani gekk leiðin til Scapa Flow, sum er ein náttúruhavn, ið varð nógv brúkt í ófriðartíð. Serliga minnast nógv ta einu hendingina, tá ein týskur kavbátur slapp inn um girðingina í havnina og torpederaði eitt risa stórt skip. Skipið, sum æt Royal Oak, sakk og 833 mans doyðu, og í øllum hurlivasanum eydnaðist tað týska kavbátinum at sleppa út aftur úr havnini.

Í hesi somu havn, Scapa Flow, var tað eisini, at allur tann hertikni týski herflotin í 1919 varð søktur. Ein ørgrynna at risa stórum skipum liggja nú á botninum har, og í dag er hetta eitt ferðafólkmál í Orknoyggjunum, har siglt verður út á støðini har skipini liggja, og so verður verður hugt niður á skipini við sjókaga.

Komin á land aftur gekk leiðin á museum, og áðrenn teir fóru umborð aftur fingu teir eisini møguleika at vitja í onkrar handlar. Umborð aftur á sluppunum var skipað fyri grillkvøldið á dekkinum, og seinni nýttu fleiri høvi at fara ein túr í býin.

Dagin eftir var hvítusunnudagur. Hvalbiarprestur taldist millum manningina, og varð skipað fyri andaktsløtu umborð, áðrenn sluppirnar báðar aftur løgdu til havs við kós ímóti Føroyum.

– Andaktsløtan, sum Ólavur Rasmussen skipaði fyri var ómetaliga hátíðarlig, sigur Per Skov, og vísir á, at hava andakt umborð á túrinum áður, men tað er nakað sum teir eru ómetaliga glaðir fyri.

Tey, sum hava sæð skránna fyr túrin hava uttan iva lagt til merkis, at tað eisini verður gjørt nógv burtur úr matinum. Og Per Skov dylir ikki fyri, at maturin verður raðfestur høgt á túrinum.

– Eg eri sjálvur kokkur á túrinum og standi fyri innkeypinum. Og eg havi alla tíðina lagt meg eftir at gera góðan mat, so har er ongin vandi fyri at nakar klænkar á túrinum, heldur Per Skov skemtandi fyri.

Eftir morgunmat og andakt gekk leiðin heim til Føroyar. Túrurin gekk væl og Jóhanna legði at í Vági, har var manningin eisini umskipað, soleiðis at teir sum skuldu norð eftir sluppu norð við Westward Ho. Klokkan átta annan hvítusunnudag legði Westward Ho at í Havn. Teir 38 á túrinum vóru troyttir, men sera glaðir fyri túrin – allir sum ein. Og sambært Per og Hans Paula, so stendur meginparturin av somu manning klárir at mynstra á hvítusunnu komandi ár, tí sluppferðin til Orknoyggjarnar er nakað heilt serligt.